# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Árni Skaale, løgtingsmaður

**Svarari:** Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

**Evni:** Fiskiskapurin á Føroyabanka í 2023

**Spurningar:**

1. Hvussu royndist skipanin, tá hugsað verður um fleksibilitet og gagnnýtslu av samlaða talinum av tillutaðum døgum í teimun trimum bólkunum, sum fingu loyvi at veiða á Føroyabanka í 2023?
2. Hvørjir bátar, greinað á bólkar, veiddu á Føroya Banka í 2023?
3. Hvussu stórt varð veiðivirðið hjá hvørjum einstøkum bólki sær?
4. Hvussu er miðalvirðið pr. veiðudag hjá hvørjum bólki sær?

**Viðmerkingar:**

Føroyabanki hevur nú verið opin í tvey ár fyri fiskiskapi, tó bert við einari eitt ára serskipan á hvørjum ári. Dentur hevur bæði árini verið lagdur á, at tað bert er tann parturin av flotanum, sum nýtir húk, ið hevur veitt har.
Tó varð fordeilingin av døgum millum bólkarnar broytt frá fiskiárinum 2022 til fiskiárið 2023.
Tað er áhugavert at fáa at vita, hvussu Føroyabanki sum fiskiøki roynist, og um tað eru broytingar í mun til fiskiárið 2022.
Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

**Á Løgtingi, 27. februar 2024**

Árni Skaale